*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Yvirlit yvir næmingar í 10. flokki skúlaárið 2009/2010 í kommununi**

| Skúli | Næmingar 2009/10 | Næmingatal í 9. fl., 2008/09 | Prosentpartur, næmingar í 10. flokk. |
|---|---|---|---|
| Kommunuskúlin | 80 | 108 | 74,07% |
| Argja skúli | 19 | 43 | 44,19% |
| Venjingarskúlin | 21 | 47 | 44,68% |
| Eysturskúlin | 54 | 112 | 48,21% |



# flokkar



*Tað eru tey trý, Mari Ann Hansen, Petur Reinert og Bergur Rasmussen, ið hava arbeitt við umskipa 10. flokk í kommunuskúlanum*



*Undirvísingin verður laga til støði hjá næmingunum*

skriva, hvat tey vilja við tí 10. árinum, hvat eru teirra veikleikar og styrkir og hvussu tey kunnu røkka teimum málum, sum verða sett, sigur Mary Ann Hansen.

Næmingarnir eru sjálvandi sera ymiskir, og tí verður undurvísingin lagað so, at teir veiku og sterku næmingarnir fáa tilfar, ið er tillagað teirra støði.

Støddfrøði kunnu tey velja, um tey vilja hava tað á nígginda– ella tíggindafloks støði og tað sama er í týskum.

Eisini er gjørligt hjá næmingunum, sum ikki eru so bókmentaliga sterkir at fáa longda starvsvenjing, tí sum Petur Reinert tekur til, so hava øll evni til okkurt, tað ræður bara um at fáa fatur á tí.

Lærararnir undirvísa ikki einsamallir, men allir fýra undirvísa øllum 80 næmingum.

– Henda mátan at arbeiða dámar okkum sera væl, og næmingarnir fáa eisini brúkt okkum upp á besta máta við hesum, sigur Bergur Rasmussen, lærari.

Mary Ann leggur eisini aftrat, at 10. flokkur nú er sera vælumtóktur at undirvísa í.

Aftrat nýggjum lærugreinum og størri ábyrgd fara næmingarnir eisini á eina uttanlandaferð á hvørjum ári. Higartil hava tey verið fýra ár í Prag, og verður nokk farið higar aftur næsta ár í mars.

– Vit leggja stóran dent á, at næmingarnir trívast væl saman, tí fungerar tað sosiala, er alt hitt lættari, sigur Petur Reinert at enda.



**Marita Johannessen, 15 ár, Havn:**
– Eg havi gingið í Kommunuskúlanum síðani eg byrjaði í skúla. Eg haldi, at man lærir meira við fýra ymiskum lærarum eftirsum man fær fýra ymiskar forkláringar. Eg valdi at fara í 10. flokk, tí eg vildi hava betri karakterir í summum evnum. Spanskt er stuttligt at læra, so ein dugur eitt sindur, um man fer at ferðast ella víðari á skúla.

**Nýggjar lærugreinir og tilboð í 10. flokki í Kommunuskúlanum**

Spanskt
Cambridge-enskt
Søga
Kristni/lívsvirði
Samstarv við vinnulívið, fyri næmingar, ið hava serliga hug tann vegin.
Uttanlandsferðir